

Lagt til rættis: Snorri Brend

ANTIKK

*Tað er lætt og bíligt at fáa eitt gamalt borð sum nýtt*

*Mynd: boligmagasinet.dk*

# Snøgga træmøblarnar bíliga

**GOTT RÁÐ** Summi elska at ganga á loppumarknaðinum, har alskyns ting og møblar eru at finna. Ofta hava møblarnir tørv á eini hjálpandi hond, men hvussu ger ein tað, um ein hvørki er handverkari ella ætlar at tað skal kosta ov nógv?

SPURNINGURIN er, hvussu ein gevur teimum gomlu og lakeraðu møblunum nýtt lív?
SVARIÐ uppá spurningin er sera einfalt, sambært boligmagasinet.dk:
Hesir antikku møblarnir eru allir gjørdir av góðum tilfari. Við at knubba og polera møblarnar, sum hava mist lakkið, við hvítari vaselinu, fæst eitt sera vakurt og yvirraskandi úrslit.

Møblarnir koma nærum av sær sjálvum at síggja út sum vóru teir ný-lakeraðir.

# Tak mynd av minnisseðlinum

**GOTT RÁÐ** Ert tú vorðin troyttur av keðiligum uppslagstalvum, er møguleiki at fáa sær eina aðra úr akryl.



LISTI

*Ein snøgg uppslagstalva, sum eisini gevur góð hugskot til skipan av innkeypunum*

*Mynd: boligmagasinet.dk*

Eitt gott hugskot er síðani at deila hana upp í øki við litføgrum klistribandi. Haraftrat ber til at festa nakrar knagar niðast, at brúka til lyklar og aðrar smálutir, sum annars hava lyndi til at blíva burtur.

Tá ein so fer til handils kann ein bara taka mynd av innkeypsseðlinum frammanundan við fartelefonini, soleiðis at ein altíð hevur listan beint við hondina.

Tá ein so kemur aftur til hús, kann ein bara viska tað út á talvuni sum varð keypt, og síðani lata restina standa soleiðis til næstu handilsferðina.